ATLANTIC AIRWAYS

SUMMARKAPPINGIN '09

**Stóra summarkappingin hjá Sosialinum**

Send inn og vinn nógvar flottar vinningar

Vika 24:
Leiðin til Billund

8 síður við spennandi tilfari um summar



# Stórfingna **baðilandið** í Billund

## Aquadome í Billund slær øll mørk

**BILLUND**

Ikki er neyðugt at leita sær ta longu leiðina til Suður-Europa fyri at fáa tað stóru baðiupplivingina. Nú er bert at seta seg í flogfarið hjá Atlantic Airways, og taka túrin frá Vágum og til Billund. Lalandia hevur satsað stórt við Aquadome-baðilandinum í Billund. Stóra vatnlandið hevur fleiri skreiðibreytir, sum er av bæði tí hóvliga og tí ógvusliga slagnum. Men teir ógvusligastu er "Tornadoin". Í gummibátum, sum taka tveir ella fýra persónar, ber til at taka ein túr í einari vatnskreiðibreyt, sum byrjar hægst uppi í Aquadome-høllini. Við rúkandi ferð fara bátarnir sendandi gjøgnum skreiðibreytina. Túrurin endar í hóvligari vatnumstøðum, so ein líka kann summa seg, áðrenn ein tekur næsta túr aftur. Tornadoin er tann fyrsta av sínum slagi í Europa.

### Fjøltáttað

Men ikki alt nýtist at vera ógvusligt. Í Aquadome-høllini í Billund finst eisini Lazy River. Tann stilli streymurin førir stóru baðiringarnar í ringrás við einari stillari ferð. Meðan ein liggur í baðiringinum, og fer við stilla streyminum, kann ein liggja og njóta tað stóra útsýnið í baðilandinum. Lazy River rennur framvið vatnskreiðibreytum, bylgjuhyljum og barnahyljum. Lazy River tryggjar, at ein eisini kann taka tað róligt í Aquadome-høllini. Leingist ein eftir størri avbjóðingum, kann ein royna serligu "Octupus"-breytina. Talan er um ein 100 metur langan túr, sum byrjar høgt uppi í Aquadome. Octupus byrjar í nøkrumsnúningum, sum føra út til fýra flatar rasarabreytir, har ein fer avstað við fullari ferð. Í barnahylinum eru fimm ymiskar skreiðibreytir, sum ganga frá stórsligna templinum, sum er miðskeiðis í Aquadome-høllini. Vatnskreiðibreytirnar eru millum fimm og tíggju metrar langar. Í Aquadome ber eisini til at keypa okkurt at drekka og eta, um hugurin er til tess.


Melda teg til Club Atlantic og

VINN FERÐASEÐLAR

og fá sertilboð sendandi við telduposti

Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.

Melda til á: www.atlantic.fo

Tel 34 10 00

ATLANTIC AIRWAYS

atlantic.fo